HARRY POTTER. Í grundini er tann foreldraleysi Harry Potter tann lítli prinsurin, i› kemur frá einari a›rari klótu. Hann veit bara ikki av tí sjálvur, at hann hevur serligar gávur, at hann hevur gandamegi í sær, sigur t‡›arin Gunnar Hoydal í samrø›u. – Haldi sjálvur, at ta› er hetta, sum nógv børn kenna seg aftur í: Hvør eri eg? Tit halda meg kanska bara vera ein lítlan lort, men bí›i› bara!

Mynd: Jens Kristian Vang

Gó› skriving, er ta› ikki gandur í huganum?

Birgir Kruse

Fyrstu fer› eg hoyrdi navni› Harry Potter, helt eg ta› var ein poppstjørna. Men sum Hodja, so bleiv eg klókari...men hvussu ert tú, Gunnar, komin tær uppí alt hatta hóvastáki› vi› Harry Potter?

Eg hyggi av og á í útlendsk blø› og tí›arrit, sum vi›gera bókmentir. Ta› man vera eitt ár ella hálvtanna› sí›ani, at eg festi meg vi› navni› Harry Potter, kanska tí at ein stórur enskur rithøvundur eitur naka› ta› sama: Dennis Potter. Ta› var hann, sum skriva›i fleiri tiltiknar, n‡skapandi sjónvarpsrø›ir, t.d. The Singing Detective. Men ta› var skjótt, at hesin n‡ggi Potter fór at gera um seg og brei›a seg til a›rar mi›lar, og heilt ørt gjørdist nú í summar, tá i› hann enda›i á forsí›unum á tí›indablø›um um allan heim, tí øll vildu keypa hann og lesa hann. Kanska aftur eitt upplop frá Disney og teimum, hugsa›i eg í fyrstani, men nú fóru ummælarar at vi›gera hann sum meira enn dugnaligt undirhald. Tá var ta›, at eg fekk ein fyrispurning frá Niels Jákup Thomsen á bókadeildini hjá lærarfelagnum. Hev›i ári› fyri t‡tt tær bá›ar klassisku bøkurnar hjá A. A. Milne um Palla Pumm, kanska var ta› tí, eg var› bi›in. Las so tær tríggjar bøkurnar, sum vóru komnar tá, og krøktur var› eg.

Hvat hevur tær dámt, at t‡›a hesa bók, sum so nógvur hávi tykist standa av, at bókahandlar allarhelst fara undir mi›náttarsølu, tá hon kemur út?

Ta› er strævi› og ótakksamt at t‡›a, illa lønt er ta› eisini. So hev›i ta› ikki veri› fyri stuttleikan, so hev›i eingin tiki› ta› upp á seg. Men hetta sá nokkso freistandi út, tí her vóru gátur og rím og fjaldir t‡dningar, sum skuldu finnast og or›ast. Og so var gott handverk í skrivingini og í stø›um skaldskapur vi›. Jú, mær hevur dámt ta› væl, serliga nú ta› var li›ugt. Men okkurt er gali› vi› arbei›streytunum.

Hvussu man ta› bera til, at hetta slagi› av bókmentum, sum fyrr - eitt nú í 70'unum og allari køksvask-realismuni, sum tá var - vóru so illa l‡ddar millum mentafólk, tí ta› seg›ist vera tann bera eskapisma, nú eru vor›nar so vælumtóktar?

Mentafólk fara ofta skeiv í sínum metingum. Postmodernisman og avbyggingin saman vi› markna›arkreftinum hava gjørt sítt til, at alt er meira fløkt og flótandi og samstundis fult av gykli. Ta › er lættari nú enn fyrr at fl‡ggja frá ver›ini, tí mentanarliga er vit øll flóttafólk, í somu løtu vit tr‡sta okkum inn á tey tr‡w'ini (ein seg›i fyri mær, at w var tekin fyri 6-talinum í summum gomlum sumeriskum fornaldarinnskriftum, so ansi› tykkum nú fyri tí bláa telduljósinum). Einki er ímóti tí at sita tryggur inni hjá sær sjálvum og fl‡ggja burtur í a›rar heimar.

Kunnu vit samanbera Harry Potter hjá J. K. Rowling vi› bøkur hjá rithøvundum sum t‡ska Michael Ende (Endaleysa søgan), svensku Astrid Lindgren (Brø›urnir Leyvuhjarta) og Lítla Prinsin hjá Saint-Exupéry...altso ta slagi› av bókum, sum rópast "fantastikkur"? Ella br‡tur naka› frá, solei›is sum tú sært ta›, í bókunum um Harry Potter?

Ta› er ringt at samanbera vi› tey klassisku verkini, tí so stutt er fráli›i›. Fyrsta Potter-bókin kom í 1997, eingin veit, hvussu ver›ur mett um 10 ár. Sjálvur havi eg ongantí› veri› naka› serliga tikin av H. C. Andersen og Lisu í Leikalandi ella ø›rum av sama slagi, har alt kann henda vi› leikum og dukkum og kortum. Ta › kann ofta enda sum ta› reina tvætl. Men har, sum ein gó› søga er, væl sett saman vi› ætlan og sni›fundigheit og hjartalagi, Lítli Prinsurin til dømis, har er ta› naka› anna›. Og í grundini er tann foreldraleysi Harry Potter tann lítli prinsurin, i› kemur frá einari a›rari klótu. Hann veit bara ikki av tí sjálvur, at hann hevur serligar gávur, at hann hevur gandamegi í sær. Haldi sjálvur, ta› er hetta, sum nógv børn kenna seg aftur í: Hvør eri eg? Tit halda meg kanska bara vera ein lítlan lort, men bí›i› bara!

Onkur hevur havt illgruna um naka› íbygt "okkult" í søgunum um Harry Potter. Ta› høvdu tey nokk eisini vi›víkjandi C. S. Lewis. Inntil tey lósu hann. Hava tey grein í sínum máli vi›víkjandi Harry Potter og hansara trøllahatti?

Í øllum sonnum hugflogi er okkurt ógreiniligt og loyndarfult, okkurt okkult. Søgan um Harry Potter er søgan um ta› gó›a móti tí ónda, men ta› vísir seg, at ta› ónda er eisini inni í teimum gó›u, og vi›hvørt er ta› ógjørligt at siga, hvat i› er hvat. Í so máta eru hesar bøkur kanska á einum hægri stø›i enn tær vanligu bókmentirnar fyri børn og ganga meira yvir í tær skaldsliga uppaftur sterkaru søgurnar hjá Astrid Lindgren.

Skemt, humor, tykist ver›a ein afturvendandi trá›ur, tá fólk tosa um J. K. Rowling og bøkurnar um Harry Potter. Hvat heldur tú? Er ta› ein stø›ug skemtilig lind í tekstinum, sum ger allan munin...?

Allan munin, ta› veit eg ikki. Men í bókunum er nógv skemt, ofta óvænta› og ofta solei›is, at hvør partur ella hvørt broti› endar vi› eini skemtiligari vi›vending av tí, sum beint í á›ni var álvari. Ta› er gott skrivligt handverk, og ta› er at undrast á, at ein so rættiliga ung sum J.K. Rowlings (solei›is vildi hon skrivast fyri at bøkurnar ikki skuldi hava ein kynsmerktan høvund) kann hava eitt so umfatandi listaligt kynstur til taks. Er hon gandakelling ella hvat? Gó› skriving, er ta› ikki gandur í huganum?

Nú tú hevur arbeitt teg gjøgnum alla ta› drúgvu fyrstu bókina um Potter, hvussu vilt tú so l‡sa tónan í bókin? Hvør klangur, grundtóni, situr eftir?

Skemt er í, sum sagt. Men grundtónin er ótryggleiki og ótti: Hvat vilja tey, at eg skal gera, hvussu skal eg gera rætt móti ø›rum og móti mær sjálvum?

Er hetta ein barnasøga, ella...? Eg meini so vi›, var hetta ein filmur, og Filmseftirliti› sá hann, hvat skuldi so frámerki› veri›?

Her er óhugni, dráp og dey›i. Eitt barnaeftirlit, manna› og kona› vi› abbum og ommum hev›i ivaleyst mælt frá at prenta bøkurnar á føroyskum og ikki lagt naka› í atfinningarnar, sum til dømis tær, i› henda havnargentan vi› egnari Harry Potter-heimasí›a í sjónvarpinum, setti fram um at fáa tær føroysku t‡›ingarnar gjørdar alt fyri eitt. Æt hon Hermione Magnussen ella okkurt sovor›i›?

Hesar søgur, tær eru vist fimm í tali fram til í dag, fevna um hópin av nøvnum. Nøvnum, sum benda á ikki sørt av uppfinsemi og skemtingarsomum lyndi hjá rithøvundanum. Rita Rivejern eitir eitt nú ein í donsku t‡›ingini. Hvussu hevur tú navngivi› persónarnar í føroysku t‡›ing tínari? Og hvør hevur framgangsmátin veri› í somáta?

F‡ra bøkur eru komnar higartil. Á føroyskum høvdu teir ivaleyst iti›: Harry Potter og vitramannasteinurin, Harry Potter og loynikamari›, Harry Potter og fangin í Azkaban og Harry Potter og eldbikari›. Ta› y›ur av sta›anøvnum og fólkanøvnum. Var ta› rætt at seta ta› yvir í føroyskt, tá i› alt anna› vísir til ensk vi›urskifti og enskt umhvørvi? Ta› ver›ur sagt, at børn skulu kunna kenna seg aftur í sínum egna, men ta› er ein misskiljing. Tey skulu kennast vi› kenslurnar og tónan, og tá ger ta› minni, at skúlin ikki hevur føroyskt navn, ella at Harry ikki eitur Haraldur í Pottinum. Men eg lati onkran tosa kollfja›ramál, ta› er tann gó›varni risin Hagrid. So øll eita síni upprunanøvn í hesari t‡›ingini. Solei›is er eisini í ø›rum t‡›ingum, eg havi sæ›, uttan kanska í navninum á onkrum eykafólki ella einum hundi ella einari kettu. Sjálvt íslendingar hava hildi› seg frá at t‡›a nøvnini, so ta› man vera á rættari lei›.

Hevur tú í t‡›ingararbei›num havt samband vi› a›rar t‡›arar, ella hugt í a›rar útgávur av Harry Potter?

Havi hugt eftir ø›rum t‡›ingum og havt ta donsku og ta íslendsku t‡›ingina innan fyri eina armlongd. Men eg má siga, at har er mangan fari› lættliga um, kanska tí at útgevarar hava siti› halakukk uppi á teimum fyri søluvinningin. Til dømis er ein dreymaspegil, sum lesur alt vi›vent, men hesir t‡›arar hava bara skriva› ta› enska rúnarmáli› uttan at speglvenda ta› á sínum egna máli.

Hvussu er arbei›slagi›, tá so drúgt bókmentaverk skal t‡›ast?

Eg hev›i ongantí› ætla› at veri› t‡›ari, ta› haldi eg meg ikki duga nóg væl føroyskt til, og so stjelur ta› ómetaliga nógva tí› frá ø›rum. T‡›ing er akkordarbei›i, so og so nógv fyri hvørja sí›u, og í listaligum arbei›i, sum øll gó› t‡›ing eigur at vera, ber ikki til at ganga upp á akkord. Arbei›slagi› hevur veri› seint, men mi›víst, umaftur og umaftur, siga hvønn setning fleiri fer›ir og í hesum føri fáa hann so lættan og fjølbroyttan, sum enski upprunateksturin er.

So kendur, sum Harry Potter og heimur hansara er blivin - hann skal eisini gerast til film - hevur títt arbei›i sum t‡›ari so á nakran hátt veri› bundi› av uppruna rættindum? Ella hevur tú kunna umsett frítt, uttan bindingar?

Forlagi› Bloomsbury, sum gevur bøkurnar út, hevur gjørt nógv burtur úr markna›arføringini, og hevur sett treytir vi› um útger›, permur, tekningar, o. s. fr. Men annars blandar ta› seg ikki í t‡›ingina. Bloomsbury er blivi› ein heimsfyritøka vi› hesum fongi, sum ta› fekk í gandapottin, men at kanna t‡›ingarnar heilt ni›ur í smámálini sum okkara, ta› orka tey tíbetur ikki.

Fert tú undir at t‡›a fleiri bøkur um Harry Potter? Ella eru onnur bókmentaverk ávegis?

Fyribils havi eg ikki lova › meg burtur til meira enn hesa fyrstu bókina um vitramannasteinin. Ta› var ikki, fyrr enn tá i› tann seinasta bókin kom út, at eg skilti, at sjey bøkur eru ætla›ar, ein fyri hvørt skúlaári› í gandaskúlanum Hogwarts, og at bøkurnar vera tjúkri og tjúkri. Har er tilfar til fleiri ársverk, og ta› var nú ikki ta›, eg ætla›i at brúka mína tí› til. Men lati› okkum nú vita, um føroysk børn, og vaksin vi›, tíma at lesa hetta og lata seg ganda.

Takk fyri - og gó›an lesna›!

Mi›nátt og tey fornisku. N‡komnu bøkurnar eftir Erling Poulsen og Anfinn í Skála hava ta› til felags vi› bókina um Harry Potter, at tær nema vi› ta› forniska. Tí hevur Bókasølan í SMS gjørt av selja tær á midnátt t‡skvøldi›

GUNNAR HOYDAL (f.1941) er útbúgvin arkitektur 1967 og vann tvey ár eftir í nor›urlendskari arkitektakapping, har evni› var gamli b‡arparturin í Havn. Frá 1972 b‡ararkitekur í høvu›ssta›num, til hann í 1997 leg›i hetta starv ni›ur og valdi burturav at skriva. Gunnar er á ø›rum sinni forma›ur í Rithøvundafelag Føroya, fyrra formansskei›i› var 1981-86. Hann hevur skriva› yrkingar, sangir og óbundnan skaldskap av ymsum slagi. Fyrstu fer› á prenti í 1959 í skúlabla›i í Sorø, har hann tók studentsprógv; frá 1964 ummæli og frásagnir í Var›anum og ø›rum tí›arritum, eisini gjørt vart vi› seg sum greinahøvundur í innlendskum og útlendskum mi›lum. Gunnar fekk bókmentavir›isløn M.A. Jacobsens 1982 og hevur tvær fer›irnar veri› í uppskoti at fáa bókmentavir›isløn Nor›urlandará›sins, 1989 og 1993. Umframt at hava t‡tt fyrstu bókina um Harry Potter, er Gunnar eisini aktuellur í sambandi vi› n‡ggju útgávuna av bókini um listamannin Ingálv av Reyni, sum Mentunargrunnur Studentafelsgsins fyrstu fer› gav út í 1989. Bókin, har Gunnar hevur skriva› tekstin, kemur út av n‡ggjum í sambandi vi› 80 ára dag Ingálvs hin 18. desember.

JOANNE KATHLEEN ROWLINGS (f.1965) í Chepstow, Gwent í Onglandi. Hon hevur eina dóttir, Jessica, var eitt skifti gift portugisiskum bla›manni, men er fráskild. Pápi Joanne's er eftirløntur og mamman doy›i í 1990. Hon hevur lisi› á Exeter University og b‡r í Edinburg í Skotlandi. Eftir at hava undirvíst í enskum í Portugal er hon nú bara millióningur, ver›ur sagt á heimasí›uni www.anglefire.com/on2/harrypotter/. Um or›ini eru hennara egnu, er ilt at siga. Lesarin kann sjálvur gera av. Eingin annar enn lesarin eigur kumpass í cyberspace. Og vilja vit senda Joannu eina heilsan, so er ta› lagamanni, sigur hon sjálv. Teldupostadressan er harrypotter@angelfire.com .

Sí›an hjá Mariu Magnussen vi› øllum um J.K.Rowling og Harry Potter er at finna á adressuni http://heima.olivant.fo/~thm/maria/rowling.htm Her er brævkassi, har vit kunnu siga okkara meining um Harry Potter. Ein annar sta›ur, sum eisini er verdur at dvøljast vi› í alnótini, er www.geocities.com/harrypotterfans.

FILMUR So hvørt okkurt n‡tt er at frætta um Harry Potter-filmin, hin fyrsta av kanska sjey, sum Chris Columbus skal leikstjórna›, kann hetta lesast á http://movies.warnerbros.com/harrypotter/cmp/newsflash.html . Sami Chris Columbus gjørdi filmin "Home Alone" vi› barnastjørnuni Macaulay Culkin í 1990. Ta› ver›ur hin 11 ára gamli Daniel Radcliffe, sum skal spæla Harry Potter. Hann spældi fyri stuttum David Copperfield í BBC. Bestu vinfólk hansara í Hogwarts skúlanum, eru Ron og Hermione. Hesar leiklutir hava javnaldrandi Rupert Grint og 10 ára gamla Emma Watson fingi›. Bretska pressan vildi ver›a vi›, at fleiri enn 60.000 børn høvdu ynskt sær hesar tríggjar leiklutir. Fyrsti filmurin um Harry Potter, sum fær heiti› eftir fyrstu bókini "Harry Potter og vitramannasteinurin" ver›ur frums‡ndur á jólum næsta ár. Longu er greitt, at hesin filmur fer at kappast vi› jólafilmin hjá Tom Hanks "Polar Express", sum ver›ur frums‡ndur um somu tí›. Jú, teir vitru vita. Men vit eiga steinin. Vitramannasteinin.